# Námsskipan

## Námsfrøðingaútbúgvingin

### 2017-2021

# Fororð

Ein námsskipan inniheldur grundreglurnar fyri lestrinum. Saman við skeiðslýsingum og yvirskipaðum reglum hjá Setrinum er námsskipanin eitt týðandi amboð, sum kunnar um rættindi og skyldur teirra lesandi.

Sambært viðtøkunum skal Lestrarráðið fáa uppskot til útbúgvingarprofilar og námsskipanir til viðgerðar og góðkenningar frá útbúgvingarleiðara, eftir at útbúgvingarleiðarin hevur fingið svar frá hoyringspørtum. Tá ið uppskot til námsskipan hevur verið viðgjørt, og vissa er fingin fyri, at viðkomandi partar eru hoyrdir, góðkennir lestrarráðið námsskipanina og letur dekaninum hana til víðari avgreiðslu.

Lestrarráðið hevur eftirlit við, at ymisku partarnir av útbúgvingini hanga saman, og at einstøk fak ella fakøki ikki broytast ov nógv í mun til endamálið við útbúgvingini. Ráðið skal eisini tryggja, at veitta undirvísingin og próvtøkukrøvini hóska til endamálið við útbúgvingini.

Í hesum skjali er námsskipanin fyri bachelorútbúgvingina til námsfrøðing lýst. Námsskipanin fyri útbúgvingina til námsfrøðing er gjørd við hesum lógargrundarlagi:

- Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskapasetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012
- Kunngerð nr. 140 frá 13. nov. 2009 um útbúgving av fólkaskúlalærarum og námsfrøðingum
- Kunngerð nr. 85 frá 9. juni 2009 um skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008 og reglur um alment próvskeið í føroyskum
- Kunngerð nr. 111 frá 31. august 2011 um broyting í kunngerð um skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008 og reglur um alment próvskeið í føroyskum
- Kunngerð um próvtalsstiga og døming, nr. 73, 31.mai 2013

Námsskipanin sigur, hvørji krøv verða sett tí lesandi, og hvørji rættindi og skyldur hann hevur sum studentur á Námsvísindadeildini/Fróðskaparsetri Føroya.

Námsskipanin er galdandi ta tíð, lesturin er ásettur at vera. Um tann lesandi vegna longda lestrartíð kemur í ta støðu, at nýggj námsskipan kemur í gildi, áðrenn studenturin hevur staðið allar próvtøkurnar, má hann gera avtalu við fyrisitingina (deildarskrivstovu/útbúgvingarleiðara) um, hvussu lesturin verður fullførdur.

Størri broytingar í námsskipanum koma í gildi við lestrarársbyrjan.

Námsskipanin inniheldur ikki skeiðslýsingar fyri tey einstøku fakini og heldur ikki almennar reglur hjá Setrinum. Hesar eru at finna á heimasíðu Setursins.

Námsskipanin fyri námsfrøðingaútbúgvingina á Námsvísindadeildini er ábyrgdarøki hjá Lestrarráðnum á Námsvísindadeildini. Útbúgvingarleiðarin hevur fakligu ábyrgdina og leggur útbúgvingina til rættis

Henda námsskipanin er góðkend á Lestrarráðsfundi xx. xxx 2019.

# Innihaldsyvirlit

1.0 Inngangur ... 4
1.1 Yvirskipað endamál við útbúgvingini ... 4
1.2 Profilur av útbúgvingini ... 5
2.0 Upptøkukrøv ... 8
2.1 Stakgreinalestur ... 8
3.0 Undirvísingarhættir ... 8
4.0 Luttøku- og møtiskylda ... 9
5.0 Grundskeið og linjur í útbúgvingini ... 9
6.1 Skiftislestur ... 10
7.0 Bygnaður og innihald í útbúgvingini ... 11
8.0 Lýsing av linjum, skeiðum og ritgerð ... 13
9.0 Próvtøkur ... 17
9.3 Almennar próvtøkutreytir ... 18
9.4 Førleiki í staving og málburði ... 19
9.5 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka ... 19
9.6 Kæruviðurskifti ... 19
10.0 7-stigin og staðið/ikki staðið ... 19
11.0 Innanseturs ella uttanseturs próvdøming ... 19
12.0 Ásetingar um bachelorritgerð ... 20
13.0 Onnur viðurskifti ... 21
13.1 Reglur um stuldur og svik í skrivligum uppgávum ... 21
13.2 Góðskriving ... 21
13.3 Farloyvi ... 21
13.4 Útskriving ... 21
13.5 Samskifti ... 22
13.6 Námsstig og arbeiðstyngd ... 22
13.7 Lestrarárið ... 22
14.0 Treytir um broyting í námsskipan ... 22

# 1.0 Inngangur

Á námsfrøðingaúbúgvingini kanna vit samspælið millum menniskja, stovn og samfelag, har tann lesandi eftir lokna útbúgving skal megna í samstarvi við onnur at skapa tryggar umstøður, og karmar fyri menning, mentan, sosialisering og læring hjá tí einstaka menniskjanum.

Námsfrøðingaútbúgvingin á Námsvísindadeildini tekur 4 ár og er fulltíðarlestur, t.e., at lesandi skulu rokna við at brúka 40 tímar um vikuna at lesa, kanna, skriva, ganga til fyrilestrar, bólkaarbeiði o.a. Stórur dentur verður lagdur á sjálvstøðugan lestur, og tí eru lutvíst fáir tímar av skipaðari undirvísing í eini floksstovu.

Tað eru ávikavist 15 og 12 undirvísingartímar à 45 minuttir um vikuna í skipaðari undirvísing á grundskeið og linjum. Harafturat skal roknast við nøkrum tímum í bólkaarbeiði o. líkn. Á flestu skeiðunum hjá 1. og 2. árs lesandi eru tríggir undirvísingardagar og tveir lesidagar. Hjá 3. og 4. árs lesandi eru vanliga tveir undirvísingardagar og tríggir lestrardagar um vikuna. Lesandi fáa eina lestrarskrá við byrjanina á hvørjum skeiði.

Hinir 20-25 tímarnar um vikuna eru ætlaðir til sjálvstøðugan lestur, at lesa pensum, skriva uppgávur, fyrireika seg til próvtøkur o.líkn.

Ein grundleggjandi táttur í hægri lestri er, at útbúgving er ikki nakað onnur hava skyldu at geva einum. Lesandi koma á hægri læristovnar at ogna sær sjálvum kunnleika og førleikar. Hetta setur stór krøv. Tað merkir, at ein fortreyt fyri at fáa væl burtur úr lestrinum er at arbeiða sjálvstøðugt, og frá fyrsta degi leggja sín egna lestur til rættis og seta tíðina av, ið krevst fyri at gerast ein góður námsfrøðingur.

### 1.1 Yvirskipað endamál við útbúgvingini

Endamálið er at útbúgva námsfrøðingar, sum eru førir fyri at virka og samstarva um heildarmenning av menniskjanum. Útbúgvingin er granskingargrundað og á slíkum støði, at hon verður viðurkend í grannalondunum, bæði yrkisrættað og sum grundstøði undir framhaldslestri.

Í útbúgvingini skulu tey lesandi menna ein námsfrøðiligan og almenndidaktiskan førleika, sum saman við einum fakligum kunnleika gevur teimum førleika at skipa fyri námsfrøðiligum virksemi á høgum stigi á dag- og serstovnum.

Útbúgvingin tekur 4 ár og er skipað sum ein bachelorútbúgving, ið er yrkisgevandi og gevur rætt til heitið baccalaurius educationes, stytt B.Ed, og telur 240 ECTS. Føroyska heitið er B.Ed. sum námsfrøðingur. Enska heitið er Bachelor of Education in pedagogical development.

## 1.2 Profilur av útbúgvingini

| |
|---|
| B.Ed. sum námsfrøðingur - Bachelor of Education in pedagogical development |

| | |
|---|---|
| SLAG AV ÚTBÚGVING OG ÁRAMÁL | Námsfrøðingaútbúgvingin er skipað sum ein B.Ed.-útbúgving, ið telur 240 námsstig. |
| ÚTBÚGVINGARSTOVNUR/-AR | Námsvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya (Department of Education, University of the Faroe Islands) |
| STOVNUR, IÐ GÓÐKENNIR ÚTBÚGVINGAR | Mentamálaráðið – stuttstavað MMR |
| TÍÐARBIL, VÍST VERÐUR TIL | Námsskipan fyri námsfrøðingaútbúgvingina er galdandi frá august 2016 |
| STIG | B.Ed. stig |

| A | ENDAMÁL |
|---|---|
| | Endamálið er at útbúgva námsfrøðingar, sum eru førir fyri at fyrireika, fremja, eftirmeta, menna og skjalprógva námsfrøðiligt og sernámsfrøðiligt arbeiði við børnum, ungum og vaksnum. Ein útbúgvin námsfrøðingur skal somuleiðis vera førur fyri at grunda yvir og meta um námsvísindaligar meginspurningar. |

| B | EYÐKENNI | |
|---|---|---|
| 1 | GREIN(AR) / EVNISØKI | Námsfrøðingaútbúgvingin er sett saman av tveimum høvuðspørtum:<br><br>1. Einum almennum pedagogiskum parti, ið fevnir um bæði dagstovna- og serøkið, og snýr seg um námsfrøðilig grundtema so sum uppaling, umsorgan, samfelag, mentan, myndan, spæl, menning, læring, sosialisering og trivnað.<br>2. Einum parti, ið er skipaður sum linjulestur.<br><br>Útbúgvingin miðar ímóti vøggustovum, barnagørðum, forskúlum, frítíðarskúlum, frítíðarheimum, ungdómshús, bústovnum, sambýlum, vardum verkstøðum og øðrum stovnum. |
| 2 | ALMENNUR / SERLIGUR DENTUR | Við útbúgvingarlok hava lesandi ognað sær skjalprógvaðan førleika at skapa innihaldsríkt og mennandi virksemi saman við teimum menniskjum, tey varða av. |
| 3 | K ÓS | Undirvísingin er granskingargrundað og yrkisrættað. |

| | | |
|---|---|---|
| | | Granskingarøkini fevna um pedagogiskar aðalspurningar. |
| 4 | SERLIG EYÐKENNI | Umframt at arbeiða við pedagogiskum og almenndidaktiskum evnum og fyribrigdum, ið eru viðkomandi í øllum pedagogiskum arbeiði, so miðsavna tey lesandi seg um tríggjar námsfrøðiligar linjugreinar. |

| C | STARVSMØGULEIKAR OG FRAMHALDSÚTBÚGVING | |
|---|---|---|
| 1 | STARVSMØGULEIKAR | Tey, ið hava lokið námsfrøðingaútbúgvingina hava skjalprógvaðan førleika at verða sett í starv innan námsfrøðiliga økið. |
| 2 | FRAMHALDSÚTBÚGVING | Eftir loknan BEd-lestur hava lesandi skjalprógvaðan førleika at fara undir framhaldslestur á ymiskum hægri lærustovnum. |

| D | ÚTBÚGVINGARHÁTTUR (ELLA: UNDIRVÍSINGAHÆTTIR OG LÆRUTILGONGDIR) | |
|---|---|---|
| 1 | ARBEIÐSLAG Í SAMBANDI VIÐ LÆRU- OG UNDIRVÍSING | Undirvísingarhættirnir eru fyrilestrar, floksundirvísing, einstaklingsuppgávur, einstaklingsframløgur, bólkaarbeiði, ið er skipað eftir ymiskum leistum, bólkaframløgur, evnisarbeiði, verkætlanararbeiði, verkstaðararbeiði, starvslærufrágreiðingar, lesiringar. o.a. |
| 2 | METINGA- OG PRÓVTØKUHÆTTIR | Skrivligar uppgávur, munnligar framløgur, synopsur, starvslærufrágreiðingar, starvslæruviðgerðir, portfolio o.a. |

| E | ÚTBÚGVINGARFØRLEIKAR |
|---|---|
| 1 | ALMENNIR FØRLEIKAR |
| | Við útbúgvingarlok hava lesandi ognað sær hesar førleikar:<br><br>**Akademiskur førleiki:** T.e. førleikin at hugsa abstrakt; at leita sær upplýsingar; at meta um kelduvirðið á fjølbroyttum tilfari; at greiða, greina og føra prógv, ið eru fakliga og etiskt væl grundað.<br><br>**Samstarvs- og samskiftisførleiki:** T.e. førleikin at samstarva og samskifta um fjølbroytt evni við starvsfelagar og aðrar yrkisbólkar.<br><br>**Virkisførleiki:** T.e. førleiki at taka avgerðir og at loysa ítøkiligar uppgávur bæði einsæris og í bólki. |
| 2 | NÁMSTREYTAÐIR FØRLEIKAR |
| | Við útbúgvingarlok hava lesandi ognað sær hesar førleikar:<br><br>**Førleiki at greina lógar- og regluverk, sum námsfrøðiliga økið verður skipað eftir:** T.e. førleikin at seta seg inn í tær lógir og kunngerðir, ið galda á námsfrøðiliga økinum, og at skapa eitt námsfrøðiligt tilboð, ið er í samsvari við lógar- og kunngerðartekstin, og førleiki at skilja og kritist meta um tann logikk, ið námsfrøðiligt arbeiði byggir á.<br><br>**Fakligur førleiki:** T.e. førleikin at nýta fjølbroytt námsfrøðilig, sálarfrøðilig og didaktisk ástøði og háttaløg, tá ið námsfrøðiligt og sernámsfrøðiligt virksemi verður fyrireikað og |

| | |
|---|---|
| | roynt í verki, og úrslit verða eftirmett.<br><br>**Førleiki at arbeiða við relatiónum og at skapa trivnað:** T.e. innlivingarevni; at virða sjónarmiðini hjá øðrum; at duga at skapa góð og sterk sambond við menniskju, ið hava ymiskar menningarfortreytir, persónsmenskur og áhugamál.<br><br>**Kanningarførleika:** T.e. førleikin at hava eina granskandi tilgongd til dagliga yrki, finna fram og nýta kanningarúrslit á námsfrøðiliga og sernámsfrøðiliga økinum.<br><br>**Sjálvseftirmeting og lívlong læra:** T.e. at duga at reflektera og meta um sín egna fakliga samleika og við persónligum førleikum støðugt at arbeiða við at menna sínar yrkisrættaðu førleikar. |

| F | FULLFÍGGJAÐUR LISTI VIÐ LÆRUÚRTØKUNI FRÁ ÚTBÚGVINGINI |
|---|---|
| | Eftir lokna útbúgving, skal hin lesandi vísa, at hann megnar, at<br><br>• greiða frá og greina tær lógir og kunngerðir, ið eru galdandi á stovnsøkinum og umseta tær til námsfrøðiligt virksemi.<br>*(T.e. dagstovnalógin, forskúlakunngerðin, námsfrøðiliga stevnumið, námsætlan forsorgarlógin, Barnarættindasáttmálin hjá ST, Salamancaviðtøkurnar o.s.fr.)*<br>• lýsa og kritiskt viðgera demokratiska og kristna siðaarvin, og hvussu hesin hevur myndað virðisgrundarlagið undir føroyska samfelagnum<br>• greiða frá og greina uppalingar- og myndanaruppgávu á stovnum<br>• viðgera hvussu samfelagskarmar, harímillum lógarverk og aðrar politiskar avgerðir, ávirka lívsrúmið, -møguleikar og -góðskuna hjá menniskjum<br>• greiða frá fjølbroyttum námsfrøðiligum, sálarfrøðiligum og didaktiskum ástøði<br>• greina og kritiskt viðgera ástøði og arbeiðshættir innan sosialisering, umsorgan, menning og læring<br>• lýsa og kritiskt viðgera ymisk ástøði um, hvussu menniskju búnast, sosialiserast mennast og læra, sæð í sálarfrøðiligum, mentanarligum og søguligum ljósi<br>• fyrireika, fremja, eftirmeta, skjalfesta dagliga námsfrøðiliga virksemi og menna ítøkiligar menningartilgongdir og verkætlanir við støði í viðurkendum ástøðum og háttaløgum, og sum skapa líkindi fyri, at menniskju trívast og mennast<br>• nýta viðkomandi fakligt ástøði og kunnleika í námsfrøðiliga virkseminum<br>• skipa námsfrøðiligt virksemi soleiðis at øll børn, ung og vaksin mennast og læra á besta hátt.<br>• skipa námsfrøðilig virksemi soleiðis, at tað gevur møguleika fyri ávirkan og medábyrgd<br>• lýsa, greina og taka avgerðir um yrkisetisk viðurskifti; greina og brúka granskingargrundaðan kunnleika í pedagogstarvinum<br>• skipa námsfrøðiligt menningararbeiði, har ímillum at menna og greina smærri granskingarverkætlanir á námsfrøðiliga økinum<br>• meta um eins egna yrkissamleika, bæði tá hugsað verður um hugburð og arbeiðshættir og viðgera, hvussu hesin ávirkar menningar-, læru- og trivnaðarmøguleikarnar hjá teimum, ið ein varðar av |

| | |
|---|---|
| | • megna at skapa góðar relatiónir við tey, ið ein varðar av, við støði í teirra menningarfortreytum, persónsmensku og áhugamálum<br>• greiða frá grundleggjandi viðurskiftum, ið gera seg galdandi, tá gott huglag og góður trivnaður skal skapast<br>• samskifta og samstarva við tey, ið námsfrøðingurin varðar av, samstarvsfelagar, foreldur, avvarandi og aðrar myndugleikar<br>• Virka fyri góðum felagsskapi millum børn, ung og vaksin |

# 2.0 Upptøkukrøv

Upptøkutreyt er gymnasial miðnámsútbúgving (kvota 1). Í serligum føri kann víkjast frá hesum kravi, um umsøkjarin á annan hátt hevur ognað sær vitan og lestrarførleika, ið kann javnsetast við gymnasiala miðnámsútbúgving (kvota 2). Fróðskaparsetur Føroya hevur møguleika til at bjóða ískoytisskeið sum lestrarfyrireiking. Fróðskaparsetur Føroya kann seta serstøk krøv um førleikar at verða tikin upp til ávísar linjur. Útbúgvingarleiðarin hevur ábyrgdina av upptøku.

### 2.1 Stakgreinalestur

Stakgreinalesandi eru lesandi, sum fylgja undirvísing og fara til próvs í einstøkum lærugreinum/skeiðum, uttan at vera innskrivað til fullan lestur.

Stakgreinalesandi søkja um upptøku til hvørt skeið sær og skulu lúka somu krøv til upptøku sum onnur lesandi. Tey ganga undir somu lestrartreytum sum fulltíðarlesandi.

Stakgreinalesandi kunnu verða tikin upp, um pláss er á skeiðinum.

Gjald er fyri stakgreinalestur. Skeiðsgjaldið er fyri undirvísing, vegleiðing, próvtøku og umsiting.

Søkt verður um upptøku til stakgreinalestur við serstøkum umsóknarblaði.

# 3.0 Undirvísingarhættir

Undirvísingin er í høvuðsheitum skipað sum fyrilestrar, floksundirvísing, bólkaarbeiði, skeið, venjingar, verkætlanir, starvsvenjingar og sum einsæris vegleiðing og eftirmeting. Væntast kann eisini, at aðrir undirvísingarhættir støðugt verða mentir og royndir.

Útbúgvingarnar á Námsvísindadeildini eru fulltíðarlestur; hetta merkir, at lesandi skulu rokna við at brúka 40 tímar um vikuna til at lesa, granska, skriva, ganga til fyrilestrar, bólkaarbeiði o.a.

Undirvísingin er ávikavist 15 undirvísingartímar um vikuna á grundskeiðum og 12 á linjunum við skipaðari undirvísing. Hinir 20-25 tímarnar um vikuna eru ætlaðir til sjálvstøðugan lestur, at lesa pensum, skriva uppgávur, fyrireika seg til próvtøkur o.líkn.

### 3.1 Bólkaarbeiði

Ein ávísur partur av lesnaðinum verður skipaður sum bólkaarbeiði. Um lesandi taka seg úr einum bólki, ella bólkurin fer í tvíningar, so hava øll í bólkinum líkarætt til at brúka tilfarið, sum er framleitt í bólkinum.

Lesandi í bólkum hava ábyrgdina av at loysa ymsar avbjóðingar bólkaarbeiði kann føra við sær. Í serligum umstøðum er møguligt at undirvísarin tekur neyðugar avgerðir fyri at bólkurin kann halda fram.

## 4.0 Luttøku- og møtiskylda

Lesandi hava skyldu at taka lut í allari undirvísing, vegleiðing og eftirmeting. Lesandi hava luttøkuskyldu til tær verkætlanir, arbeiðsuppgávur, venjingar o.a., ið teimum verða álagdar, og undirvísararnir hava skyldu at skráseta luttøkuna hjá lesandi. Mishald av luttøkuni kann hava við sær, at lesandi ikki kunnu verða eftirmett ella fara til próvtøku, alt eftir, hvussu nógv frávera talan er um (sí fylgiskjal).

## 5.0 Grundskeið og linjur í útbúgvingini

### 5.1 Grundskeið

Fyrstu tvey lestrarárini verður undirvíst í grundskeiðum, ið geva eina grundleggjandi fakliga vitan innan alt námsfrøðiliga øki. Hesi skeið fevna um vísindaástøði, lívsáskoðan og siðalæru, føroyskt, námsfrøði & didaktik, námsfrøðilig sálarfrøði, málmenning, kreativitet, serøkið, sosiologi og barna- og ungdómsmentan.

### 5.2 Linjulestur

Triðja og fjórða lestrarár skulu tey lesandi á námsfrøðingaútbúgvingini velja tríggjar ymiskar linjur. Møguleiki er at velja ímillum 7 linjur, tríggjar námsfrøðiligar linjur og tríggjar samlesturlinjur, ið verða lisnar saman við læraralesandi.

Námsfrøðiligu linjurnar eru:

- Smábarnafrøði
- Kreativt námsfrøðiligt arbeiði
- Heilsa, kroppur og rørsla
- Náttúra og mentan

Samlesturlinjurnar eru:

- Skúlabúgving/innskúling
- Námsfrøðilig leiðsla
- Sernámsfrøði

# 6.0 Starvslæran í útbúgvingini

Starvslæran fevnir um 240 starvslærutímar og 24 samrøðutímar tvey tey fyrstu lestrarárini. Á hvørjari linju eru 40 starvslærutímar og 4 samrøðutímar, tvs. 280 starvslærutímar og 28 samrøðutímar fyri allar tríggjar linjurnar. Fjórða lestrarár er starvslæran 160 starvslærutímar og 16 samrøðutímar. Íalt eru 680 starvslærutímar og 68 samrøðutímar á námsfrøðingaútbúgvingini.

**6.0.1. Starvslæran 1. lestrarár:**
Starvslæran er málrættað praksis á dagstovnaøkinum, har tey lesandi fáa innlit og kunna hugsavna seg um pedagogiska yrkið í praksis, og hvussu tey sjálvi roynast sum pedagogar í dagsins samfelag. Eftir starvslæruna skulu tey lesandi eftirmetast sambært skeiðlýsingini.

**6.0.2 Starvlæran 2. lestrarár:**
Starvslæran er málrættað serøkinum. Innan hetta økið hevur tað alstóran týdning, at tey lesandi fáa nøktandi stundir at koma inn í sernámsfrøðiliga arbeiðið á einum stovni, fyri at vinna álit hjá brúkaranum og megna at fyrihalda seg til tær ymisku avbjóðingarnar hetta økið bjóðar. Tann lesandi skal virka við støði í tí fakliga grundarlagnum sum er lagt í sernámsfrøðiligu undirvísingini. Eftir starvslæruna skulu tey lesandi eftirmetast sambært skeiðlýsingini.

**6.0.3 Starvslæran 3. lestrarár og 4. lestrarár, fyrra hálvár:**
Starvslæran verður framd sum ein praksispartur á linjunum, sum fyri hvørja linju samsvarar 2 vikur (40 starvslærutímar og 4 samrøðutímar). Fakliga innihaldið er avgerandi fyri, hvussu praksisparturin verður skipaður.

**6.0.4 Starvslæran 4. lestrarár, seinna hálvár:**
Síðsta starvslæran er einsæris, har tann lesandi skal arbeiða sjálvstøðugt. Starvslæran kann takast í Føroyum og uttanlands. Starvslæran tekur støði í vitan, sum er tilognað gjøgnum alla útbúgvingina. Starvslæruøkið, endamál og arbeiðstilgongd kann vera empiri til B.Ed.-ritgerðina. Eftir starvslæruna skulu tey lesandi eftirmetast sambært skeiðlýsingini.

**6.0.5 Eftirmeting av starvslæruni**
Eftir starvslæruna skal starvslæruvegleiðarin senda Námsvísindadeildini eftirmetingarskjal, sum endar við heildarmeting um starvslæran er staðin/ikki staðin.
Akkersfólkið (t.e. undirvísarin) hevur skyldu at greiða teimum lesandi frá øllum viðurskiftum, sum eru starvslæruni viðkomandi og hevur høvuðsábyrgdina av øllum samskifti millum starvslærustovn og Námsvísindadeildina. Nærri ásetingar um endamál og innihald, uppgávu starvslæruvegleiðara, miðvegissamrøðu og eftirmeting er at finna í starvslæruhondbókini.

## 6.1 Skiftislestur

Møguligt er at taka í mesta lagi 60 ECTS frá øðrum universiteti sum skiftislesandi. Mælt verður til, at lesandi, sum hava hug at fara uttanlands sum skiftislesandi, fara 2. ella 3. árið, og taka antin eina linju (40 ECTS) og/ella pedagogisk fak svarandi til 20 ECTS. Áðrenn farið verður á skiftislestur, skulu øll fak undangóðkennast av lestrarráðnum ella, um neyðugt, útbúgvingarleiðaranum. Lesandi sum hava áhuga í skiftislestri skula seta seta seg í samband við lestrarvegleiðingina.

# 7.0 Bygnaður og innihald í útbúgvingini

Námsfrøðingaútbúgvingin er fulltíðarlestur í fýra ár, og telur 240 ECTS. Hvørt ár er skipað í tvær lestrarhálvur, heyst- og várhálva. Øll skeið hava eitt ECTS-stigatal, ið sigur frá, hvussu nógv arbeiðsorka krevst av teimum lesandi. Hvørt lestrarár telur 60 ECTS, og roknað verður við, at eitt ECTS svarar til 25-30 arbeiðstímar. Útbúgvingin endar við einari B.Ed.-ritgerð.

Undirvíst verður 15 undirvísingartímar um vikuna á grundskeiðum og 12 undirvísingartímar um vikuna á linjunum.

Á linjunum eru tríggjar samlesturlinjur fyri námsfrøðinga- og læraralesandi.

Endamál, innihald og vav (tímatal) fyri allar partar av námsfrøðingaútbúgvingini verður nærri ásett í ECTS-skeiðslýsingum, ið útbúgvingarleiðarin skal góðkenna. Nærri ásetingar fyri endamáli, innihaldi o.ø. eru tilskilaðar í ECTS-lýsingum fyri hvørt skeiðið sær.

Skeiðslýsingar, við upplýsingum um støðd, próvdøming, undirvísingarhættir, próvtøkuslag, próvtalastigi, hvørt próvdømingin er innansetturs ella uttansetturs síggjast á heimasíðu Setursins.

Leinki til skeiðslýsingar hoyrandi til námsskipan 2016-2020.

Námsfrøðingaútbúgvingin er skipað við kravdum grundskeiðum, og valfríum linjugreinum. Starvslæra er kravdur partur av bæði grundfakum og linjufakum.

Niðanfyri er eitt yvirlit yvir lestrargongdina, nær skeið, linjur og ritgerð eru í útbúgvingini:

| | | | 1. árið | | 2. árið | | 3. árið | | 4. árið | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | ECTS | 1.sem. | 2.sem. | 3.sem. | 4.sem. | 5.sem. | 6.sem. | 7.sem. | 8.sem. |
| 1.árið: Grundfak | Livsáskoðan og siðalæra | 5 | X | | | | | | | |
| | Vísindaástøði | 5 | X | | | | | | | |
| | Føroyskt | 10 | X | | | | | | | |
| | Námsfrøðilig sálarfrøði | 10 | X | | | | | | | |
| | Námsfrøði og didaktik | 30 | | X | | | | | | |
| | Starvslæra | (10) | | X | | | | | | |
| 2. árið: Grundfak | Málmenning | 10 | | | X | | | | | |
| | Barna- og ungdómsmentan | 5 | | | X | | | | | |
| | Kreativt námsfrøðiligt virksemi | 10 | | | X | | | | | |
| | Starvslæra | (3) | | | X | | | | | |
| | Menniskja, stovnur og samfelag | 10 | | | | X | | | | |
| | Sernámsfrøði | 25 | | | | X | | | | |
| | Starvslæra | (10) | | | | X | | | | |
| 3.árið: Linjulestur | Linjugrein I | 30 | | | | | X | | | |
| | Starvslæra (praksis) | (3) | | | | | X | | | |
| | Linjugrein II | 30 | | | | | | X | | |
| | Starvslæra (praksis) | (3) | | | | | | X | | |
| 4.árið Linjulestur | Linjugrein III | 30 | | | | | | | X | |
| | Starvslæra (praksis) | (3) | | | | | | | X | |
| | Starvslæra | 15 | | | | | | | | X |
| | B.Ed. | 15 | | | | | | | | X |

**Gevið gætur:** Tað kann koma fyri, at raðfylgjan av skeiðum kann broytast frá ári til ár.

### 7.1 Stigvøkstur í útbúgvingini

Fyri at skapa stigvøkstur (progressión) í útbúgvingina, er hon skipað á henda hátt:

1. lestrarár: Námsfrøðingalesandi fara undir lesturin við at ogna sær grundleggjandi lestrarførleikar og ogna sær vitan, sum øllum tørvar, ið arbeiða við menniskjum og menning teirra. Síðani savna tey seg um grundleggjandi sálarfrøðiliga, námsfrøðiliga og didaktiska vitan og amboð. Seinni fara tey at royna sína vitan í verki á einum dagstovni.

2. lestrarár: Tey lesandi arbeiða við málmenning, mentan og siðsøgu, sum ein grundleggjandi førleiki í menningini hjá menniskjanum. Síðan verður arbeitt við menniskja, stovni og samfelag, har dentur verður lagdur á relatiónina millum hesar tríggjar eindirnar. Eftir hetta savna tey lesandi seg um serøkið, har tey fáa eina grundleggjandi vitan um hvussu arbeitt verður við menniskjum við serligum tørvi, har tey seinni royna sína vitan í verki á einum serstovni.

3. lestrarár: Tey lesandi velja tvær av trimum námsfrøðiligum linjum. Tey nema sær ta fakligu vitanina, ið krevst, fyri námsfrøðiliga og didaktiskt at kunna skapa eitt mennandi námsfrøðiligt umhvørvi. Starvslæra er partur av hesum linjulestri.

4. lestrarár: Tey lesandi velja sær ta síðstu linjugreinina, og lestrarleisturin er tann sami, sum triðja árið. Síðan fara lesandi í eina endaliga sjálvstøðuga einsæris starvslæru. Síðsti fjórðingurin av fjórða lestrarári er settur av til bachelorritgerð.

# 8.0 Lýsing av linjum, skeiðum og ritgerð

### 8.1 Fyrsta lestrarár

#### 8.1.1 Lívsákoðan og siðalæra

Endamálið við skeiðnum er, at lesandi skilja hvønn leiklut lívsáskoðan og siðalæra hava í teirra yrki, at tey 1) nema sær innlit í týðandi tættir í siðvenjum, ið hava myndað okkara samfelag, gerast tilvitað um hvussu hetta ávirkar virkisøki hjá námsfrøðingayrkinum, og læra at rúma menniskjum við ymsum lívsáskoðanum á dag- og øðrum stovnum, ið námsfrøðingar starvast á; 2) skilja grundleggjandi etisk ástøði og hugtøk og duga at brúka tey í námsfrøðiligum støðum; og 3) byrja at hugleiða um teirra egna leiklut sum komandi námsfrøðingar, ið skulu stuðla menningini og myndanini av menniskjum á føroyskum dagstovnum, o. líkn.

#### 8.1.2 Vísindaástøði

Endamálið við skeiðnum er, at lesandi nema sær innlit í grundleggjandi ástøði og hugtøk í vísindaástøði, at tey læra at skyna ímillum tær vísindaligu stevnur, ið mynda vísindaliga kjakið á námsfrøðiliga økinum, og at tey gerast tilvitað um, hvussu hesar stevnur eru viðkomandi fyri yrkisøkini hjá námsfrøðingum.

### 8.1.3 Føroyskt

Endamálið við skeiðnum er at geva tí lesandi innlit í týdningin, ið mál hevur fyri menning og samleika einstaklingsins sum samleika-, mentanar- og vitanarberi. At tann lesandi mennir sín skrivliga førleika.

### 8.1.4 Námsfrøðilig sálarfrøði

Endamálið við skeiðnum er: • at tann lesandi nemur sær eina grundleggjandi vitan um námsfrøðiliga sálarfrøði. • at tann lesandi fer at hugsavna seg um partar av sálarfrøðiligum vísindi, ið eru viðkomandi fyri arbeiði teirra sum námsfrøðingar við ymiskar bólkar av menniskjum. • at tann lesandi fær eina fatan av ymiskum hugtøkum út frá ymiskum ástøðiligum perspektivum. • at tann lesandi fær eina grundleggjandi vitan um, hvussu menniskju læra og hvussu læring og menning kann stimbrast og motiverast. • at tann lesandi lærir seg at reflektera yvir ymisk ástøði.

### 8.1.5 Námsfrøði & didaktik I

Endamálið við skeiðnum er, at tann lesandi fær eina grundleggjandi vitan um og innlit í námsfrøðina sum fakøkið, har undirvíst verður í lógarkarmum á námsfrøðiliga økinum. At tann lesandi lærir at knýta hesa vitan at dagliga arbeiðinum á stovnum og til virksemi, sum hevur við børn og ung at gera.

### 8.1.6 Námsfrøði & didaktik II

Endamálið við skeiðnum er at tey lesandi fara í starvslæru at nema sær kunnleika um námsfrøðiliga arbeiðsøkið. Í starvslæruni skulu tey lesandi: 1. ogna sær vitan um, hvussu ein arbeiðir við børnum á dagstovnaøkinum, 2. menna førleikar at skipa námsfrøðiligt frálæruvirksemi, har ástøði og praksis verður samantvinna og 3. eftirmeta starvslæruna.

## 8.2 Annað lestrarár:

### 8.2.1 Mál- og lesimenning

Endamálið við skeiðnum er at geva tí lesandi innlit í týdningin, ið mál hevur fyri menningina hjá barninum.Tey lesandi fáa innlit í máltøku fyrstu árini, týdningin málsliga menningin hevur fyri lesimenning, hví málsligt virksemi hevur týdning og hvussu farast kann fram í verki. Tey fáa innlit í føroyska læruumhvørvið og hvussu tað kann brúkast í námsfrøðiligum virksemi.

### 8.2.2. Barna- og ungdómsmentan

Endamálið við skeiðnum er, at lesandi nema sær vitan um barna- og ungdómsmentanir, ymiskar fatanir av børnum og barndómi og hugburðurin til børn, og hvussu barndómurin eru broyttur gjøgnum tíðina, barna- og ungdómsmentanir í nútíðarsamfelagnum, barnsins- og ungdómsins egnu sjónarhorn, barna- og ungdómsgransking, og hvussu lívið hjá børnum og ungum verður ávirkað av samfelagsligum og mentanarligum rákum.

### 8.2.3. Kreativt námsfrøðiligt virksemi

Endamálið við skeiðnum er, at tey lesandi skulu nema sær ítøkiligar førleikar og ástøðiligt grundarlag undir kreativum námsfrøðiligum arbeiði. Tey skula nema sær innlit í tann partin av

arbeiðsøkinum hjá námsfrøðingum, sum snýr seg um mennandi virksemi fyri ymsu málbólkarnar á námsfrøðiliga økinum.

### 8.2.4. Menniskja, stovnur og samfelag

Endamálið við skeiðnum er, at tey lesandi skilja samanhangin millum menniskja, einsæris og sum bólkur, stovnsøki og samfelagið. At kunna fyrihalda seg kritiskt og tulkandi um samanspælið millum áhugapartarnar á námsfrøðiliga økinum. Tey lesandi skula tilogna sær fortreytirnar fyri at virka professionelt og kunna virka í einum samstarvi. Harumframt skula tey megna at taka støði í tí føroyska samfelagnum.

### 8.2.5. Serøkið I

Á skeiðinum nemur tann lesandi sær kunnleika um sernámsfrøðilig ástøði og sernámsfrøðiliga granskingarøkið, har týðandi og nútíðar ástøði, hugtøk og háttaløg verða viðgjørd. Tann lesandi fær innlit í sernámsfrøðiliga økið og hvørjar arbeiðsuppgávur námsfrøðingurin skal útinna.

### 8.2.6. Serøkið II

Á hesum skeiðið nema tey lesandi sær kunnleika um tað sernámsfrøðiliga arbeiðsøkið. Endamálið við skeiðnum er, at tey lesandi skulu megna at knýta ástøði við praksis

## 8.3 Triðja og fjórða lestrarár (linjulestur)

### 8.3.1 Námsfrøðiligu linjurnar:

#### 8.3.1.1 Kreativ námsfrøði

Endamálið við skeiðnum er, at tey lesandi skulu víðka sína vitan og førleikar at meta um, fyrireika og seta í verk málrættað kreativt virksemi fyri ymiskar málbólkar á námsfrøðiliga økinum.
Tey skulu kenna, og vera før fyri at viðgera ástøði á hægri stigi innan estetiskar lærutilgongdir, fantasi, kreativitet og skapandi virksemi, harímillum Storyline.
Kenna og duga at brúka ymiskt tilfar og amboð, so tey eru før fyri at seta í verk skapandi arbeiði, sum stuðlar uppundir námsfrøðiligu stevnumiðini fyri dagstovnaøkið. Greina, viðgera og samskifta um, hvussu kreativt virksemi kann stimbra menningina hjá einstaklingum og bólkum.
Arbeiða burðardygt í samband við kreativt, námsfrøðiligt arbeiði, harundir place-based learning.

#### 8.3.1.2 Heilsa kroppur og rørsla

Endamálið við linjuni er, at tey lesandi duga at skilja sambandi millum spæl og læring og ogna sær vitan um spælitilgongdir, ið hóska til aldursbólkin.
Kenna sambandið millum kropsligt, sálarligt og sosialt virksemi og fáa bæði verkligan og ástøðiligan kunnleika um, hvussu hendan vitan verður samantvinnað í dagliga virkeminum.
At tey lesandi duga at brúka námsætlanir sum grundarlag fyri fyrireiking,leggja til rættis, gjøgnumføra, eftirmeta og skjalprógva undirvísingar- og lærugongdir í rørslu, sum menna rørsluførleikan, heilsustøðuna, sosiala førleikan og dagliga trivnaðin hjá vøggustovu og barnagarðsbørnum.
Harnæst fáa kunnleika um og megna at leggja til rættis skráir hóskandi til børn og ung við serligum avbjóðingum.

Grundleggjandi rørsluførleikar í vatni: Tann lesandi skal ognað sær vitan um grundreglurnar viðvíkjandi rørslum í vatni og fata hesar gjøgnum verkligar royndir.

### 8.3.1.3 Smábarnafrøði

Endamálið við skeiðnum er, at tey lesandi skulu ogna sær fakligan kunnleika í og ástøðiligt grundarlag undir virkseminum á dagstovnaøkinum. Tey lesandi skulu eisini nema sær kunnleika um týdningin av viðurkenning og tí góðu relatiónini. Eisini skulu tey lesandi gerast tilvitaði um egnan hugburð og leiklut, við tí endamáli at skapa eitt trygt, mennandi og læruríkt umhvørvi fyri einstaka barnið og barnabólkin. Harumframt skulu tey lesandi ogna sær kunnleika um hvat eyðkennir barndómin, barnasýni, menningina og sosialiseringina hjá børnum á dagstovnaøkinum.
Endamálið við skeiðnum er, at tey lesandi skulu ogna sær vitan um hvussu børn gerast virkin og luttakandi á dagstovnunum og hvørja ávirkan námsfrøðingurin hevur á hetta. Tey lesandi skulu eisini nema sær kunnleika um hvat kann hava ávirkan á luttøkuna hjá einum barni, bæði einsæris og í bólki og hvørja ávirkan karmarnir kunnu hava á hetta.

### 8.3.1.4 Náttúra og mentan

**8.3.2. Samlestur linjurnar:**

### 8.3.2.1 Sernámsfrøði

Tann lesandi skal ogna sær innlit í fyribrigdini normalitetur og frávik, serliga í stovns- og skúlahøpi. Duga at meta um tørvin í hesum sambandinum bæði generelt og í serligum høpi hjá bæði einstaklinginum og bólkinum og duga at velja og grundgeva valið av hóskandi praksis og arbeiðshættum, sum eru í tráð við tørv og nýggja vitan á økinum. Megna at samstarva við fakfelagar og onnur.
Endamálið við skeiðnum og starvslæruni er, at tey lesandi: • Seta sær grundaðan persónligan og fakligan málsetning við starvslæruni. • Seta seg inn í eitt sjálvvalt viðkomandi evni (ástøði ella arbeiðshátt), sum tey vilja kanna á starvsløruplássinum. • Fáa innlit í tað námsfrøðiliga arbeiðið og hugburðin á starvsløruplássinum. • Seta seg inn í námsfrøðiliga tørvin hjá børnunum á starvsløruplássinum.

### 8.3.2.2 Námsfrøðilig leiðsla

Endamálið við linjugreinini er at geva teimum lesandi ástøðiligan og verkligan kunnleika um leiðslu til nýtslu innan dagstovnar, serstovnar ella skúlar. Vit hugsavna okkum bæði um leiðslu, ið vanligir námsfrøðingar og lærarar koma at útinna í teirra starvi, og um leiðslu, ið námsfrøðingar og lærarar í ymsum sløgum av formellum leiðslustørvum útinna.

### 8.3.2.3 Skúlabúgving/innskúling

Endamálið við fyrta skeiðnum er, at tey lesandi skulu nema sær fakligan kunnleika í og ástøðiligt grundarlag fyri virksemi í skúlabúgving og innskúling. Tey skulu fáa innlit í arbeiðsøkið hjá námsfrøðingum og lærarum fyri at kunna samstarva á besta hátt, við tí endamáli at skapa eitt trygt,

mennandi, kreativt og lærurikt umhvørvi fyri einstaka barnið. Harafturat skal tann lesandi ogna sær kunnleika um, hvat eyðkennir menningarstøði og sosialisering hjá børnum í skúlabúgvingini og innskúlingini.
Á næsta skeiðnum skula tey lesandi ogna sær vitan um tað virkna barnið í skúlabyrjanini. Tey skulu nema sær kunnleika um móttøkuna av børnunum í innskúlingini, hvat eyðkennir innskúlingina og viðkomandi didaktiskar tilgongdir. Hetta við atliti til at seta barnið í miðdepilin og megna at næmingalaga tað námsfrøðiliga virksemi.

### 8.4 Fjórða lestrarár, seinna hálvár

#### 8.4.1. Starvslæra

Lesandi skulu í eina sjálvstøðuga starvslæru. Í starvslæruni skulu tey lesandi vísa teirra yrkisførleikar í verki bæði sjálvstøðugt og í samstarvi við borgarar, børn, vaksin og starvsfólk á stovnunum. Hetta við støði í fakligum kunnleika, refleksiónum og etiskum tilviti, ið skal samantvinnast við og í praksis.

#### 8.4.2. B.Ed.-ritgerðin

Tann lesandi skal skriva eina ritgerð, har hann skal sýna sín førleika til yrkið sum námsfrøðingur. Lesandi skulu megna at viðgera og seta viðkomandi spurningar um arbeiðsuppgávur sum námsfrøðingur, har tey samantvinna vísindaligt ástøði og háttalag við empiri.
Tann lesandi velur eitt evni og orðar ein spurdóm í samráð við vegleiðaran innan námsfrøðiligu fakøkini, ið er viðkomandi fyri starvsøkið. Spurdómurin skal viðgerast við støði í viðkomandi ástøðum, háttaløgum og kanningarúrslitum.

## 9.0 Prófvtøkur

### 9.1 Prófmeting av lesandi
Øll skeið enda við eftirmeting ella próvtøku. Í skeiðslýsingunum verður nærri ásett, um eftirmetingar og próvtøkur eru innanhýsis ella við uttanhýsis próvdómara. Skilt verður millum, um avrikið verður mett sum staðið/ikki staðið, 7-próvtalsstiganum, ella eftir øðrum góðkendum próvtalsstiga.
Eftirmetingar og próvtøkur kunnu verða skipaðar sum einstaklingsavrik ella í bólki. Lesandi fáa grundgivna lýsing av einstøku eftirmetingini og próvtøkuni.
Eftirmetingarúrslit verða mett annaðhvørt sum staðin ella ikki staðin ella við einum próvtali. Próvtøl verða givin eftir galdandi próvtalsstiga.

### 9.2 Uppgávusløg og metingarhættir

Tá tann lesandi er upptikin á útbúgvingina, skal eitt innskrivingarskjal útfyllast og latast Lestrarskrivstovuni. Tá hetta er gjørt, er tann lesandi samstundis innskrivaður til allar próvtøkurnar í útbúgvingini.

Lesandi, sum hava verið í farloyvi, skulu melda seg til fakini, tey skulu hava, á skrivstovuni á deildini.

Próvtøka er í hvørjari lærugrein sær, og hon verður skipað eftir einum av niðanfyri standandi próvtøkusløgum, ella sum ein samanseting av hesum:

- Stórar og smáar spurdómsstýrdar uppgávur
- Stórar og smáar skrivligar uppgávur við ásettum uppgávuorðingum
- Fakligar ritroyndir
- Synopsur
- Verkligt arbeiði
- Munnligar framløgur við og uttan opponering
- Munnligar próvtøkur
- Skrivligar próvtøkur
- Portfolio við munnligari próvtøku
- Loggbók
- Starvslæra

Metingarhættir eru fleiri. Eftirmeting fer fram í bólki ella einsæris. Hetta verður kunnað um í skeiðslýsingunum og lestraræetlanunum til hvørt skeið.

Tey lesandi fáa nærri vegleiðing um uppgávur og próvtøkur á hvørjum skeiðið sær

Vísindaligir tekstir eru høvuðsgrundarlagið undir øllum skrivligum uppgávum. Hvørja ferð, tekstir verða brúktir, skulu kelduávísingar verða settar upp. Kelduávísingarnar verða settar upp eftir APA tilvísingarlistanum.

Tey lesandi fáa nærri vegleiðing um ymisku uppgávusløgini, áðrenn uppgávurnar skulu gerast.

Vísindaligir tekstir eru høvuðsgrundarlagið undir øllum skrivligum uppgávum. Hvørja ferð, tekstir verða brúktir, skulu kelduávísingar verða settar upp. Kelduávísingarnar verða settar upp eftir APA tilvísingarlistanum, sum er á: http://kildekompasset.no/

Próvtøkurnar og teirra raðfylgja í lestrargongdini síggjast í bygnaðinum í 7.0.

### 9.3 Almennar próvtøkutreytir

Fyri at fara upp til próvtøku í einum skeiði skal lesandi hava luttikið í øllum kravdum lestrarvirkni, uppgávum, venjingum, innlatingum og royndum, sum liggja frammanundan próvtøkuni, umframt hildið kravdu møtiskylduna.

Um lesandi ikki møtir til próvtøku og ikki hevur meldað frá henni í seinasta lagi vikudagin undan próvtøkudegnum, verður viðkomandi skrásettur fyri eina fullgilduga próvtøkuroynd við próvtalinum 00.

Lesandi kann ikki fara upp í próvtøku í bachelorverkætlanini, fyrr enn 225 ECTS av teimum kravdu 240 ECTS eru staðin.

Lesandi kann í mesta lagi fara upp tríggjar (3) ferðir til somu próvtøku ella aðra døming. Um skeiðið ikki verður staðið við fyrstu roynd, er møguligt at fara til endurpróvtøku tvær ferðir.

Dekanurin kann loyva einum lesandi at fara upp eina fjórðu (4) ferð um serlig viðurskifti gera seg galdandi.

Allar skrivligar innlatingar skulu latast inn á Moodle.

### 9.4 Førleiki í rættskriving og greiðum akademiskum málburði

Í metingini av skrivligum uppgávum er førleikin í rættskriving og greiðum akademiskum málburði partur av tí, sum verður mett, hóast høvuðsdenturin verður lagdur á, í hvønn mun tey lesandi hava nátt ásettu læruúrtøkunum.

### 9.5 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka

Um lesandi ikki stendur eina próvtøku, kann hann fara til endurpróvtøku. Námsvísindadeildin ásetur tíðina. Reglurnar fyri vanligu próvtøkuna eru eisini galdandi fyri endurpróvtøkuna. Sí eisini ásetingar um tal av endurpróvtøkum undir almennum próvtøkutreytum.

Námsvísindadeildin ásetur tíðina fyri sjúkrapróvtøku. Reglurnar fyri vanligu próvtøkuna eru eisini galdandi fyri sjúkrapróvtøkuna. Læknaváttan er kravd til sjúkrapróvtøku. Sjúkrapróvtøka telur ikki við sum endurpróvtøka. Lesandi sum ikki hevur staðið eitt kravt skeið í útbúgvingini eftir tríggjar royndir, hevur ikki møguleika at gjøgnumføra útbúgvingina.

### 9.6 Kæruviðurskifti

Kærur um próvtøkur, próvtøkuhættir, próvdøming, próvskjal ella aðra døming, sum er partur av próvtøkuni, undantikið døming av starvslæru, verða stílaðar til dekanin og latnar skrivstovuni á Námsvísindadeildini. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin og vera latin inn í seinasta lagi 2 vikur aftaná, at dømingin er kunngjørd.

## 10.0 7-stigin og staðið/ikki staðið

Próvdømingin verður givin sum met eftir 7-talsstiganum ella sum “staðið/ikki staðið”. Fyri at hava staðið fakið krevst metið 02. Próvtalstigin er lýstur í serstakari kunngerð.

Frá lestrarárinum 2019/20 skulu minst 2/3 av próvtøkunum (160 ECTS) vera dømdar av við próvtali, og í mesta lagi 1/3 av próvtøkunum (80 ECTS) kunnu verða dømdar sum staðið/ikki staðið. Próvtøkutreytirnar í teimum einstøku skeiðunum standa í skeiðslýsingunum.

## 11.0 Innanseturs ella uttanseturs próvdøming

Próvdømingin kann vera við uttansetursella við innanseturspróvdómara. Tá próvdømingin er uttansetursverður avrikið dømt av undirvísaranum og einum próvdómara, sum ikki er í starvi á Fróðskaparsetrinum. Uttanseturs próvdómarar skulu góðkennast av Mentamálaráðnum. Tá próvtøkan er innanseturs, verður avrikið dømt av undirvísaranum og einum vísindastarvsfólki á Fróðskaparsetrinum.

Frá lestrarárinum 2019/20 skulu minst 2/3 av próvtøkunum (160 ECTS) vera dømdar av uttanseturspróvdómara, og í mesta lagi 1/3 av próvtøkunum (80 ECTS) kunnu verða dømdar av innanseturs próvdómara. Próvtøkutreytirnar í teimum einstøku skeiðunum standa í skeiðslýsingunum.

# 12.0 Ásetingar um bachelorritgerð

Fjórða lestrarár endar endar við bachelorverkætlan, ið telur 15 ECTS-stig. Verkætlanin skal verða rættað móti endamálinum við útbúgvingini til B.Ed innan námsfrøðingayrkið, og skal hava slíkt støði, at hon verður viðurkend sum grundarlag undir framhaldslestri, bæði í Føroyum og uttanlands.

Fyri at kunna fara upp í próvtøku í bachelorverkætlanini skal tann lesandi hava staðið øll skeið (í minsta lagi 225 ECTS) og lokið møgulig onnur krøv í útbúgvingini.

Endamálið við ritgerðini er, at tann lesandi sýnir sín førleika til yrkið sum námsfrøðingur. Lesandi skulu megna at seta viðkomandi spurningar um arbeiðsuppgávur sum námsfrøðingur, har tey samantvinna vísindaligt ástøði og háttalag við empiri.

Ritgerðin verður skipað kring ein spurdóm. Tann lesandi velur eitt evni og orðar ein spurdóm í samráð við vegleiðaran innan námsfrøðiligu fakøkini, ið er viðkomandi fyri starvsøkið. Spurdómurin skal viðgerast við støði í viðkomandi ástøðum, háttaløgum og kanningarúrslitum.

Bachelorverkætlanin kann skrivast einsæris ella í bólki við í mesta lagi 3 luttakarum.

Bachelorverkætlanin endar við einsæris munnligari próvtøku, sum hevur sítt støði í ritgerðini, og har tann einstaki ábyrgdast alla ritgerðina.

Bachelorritgerðin skal latast inn á serstaka stevnu á Moodle, og trý eintøk í pappírsformi skulu latast skrivstovuni.

Eitt próvtal verður givið fyri samlaða avrikið.

Námsfrøðinga- og læraralesandi kunnu í bólki verða saman um at skriva og fara til munnliga próvtøku í bachelorverkætlan.

Nærri reglur um bachelorverkætlanina eru ásettar í uppritinum *Bachelorverkætlanin – reglur og mannagongdir*.

# 13.0 Onnur viðurskifti

## 13.1 Reglur um stuldur og svik í skrivligum uppgávum

Ritstuldur og svik verður ikki góðtikið. Verður stuldur og svik avdúkað í skrivligum uppgávum, bæði próvtøkuuppgávum og øðrum innlatingum, fær hetta avleiðingar, og í ringasta føri kann tað merkja burturvísing av Fróðskaparsetrinum *(sí lestrarhandbókina fyri Fróðskaparsetur Føroya).*

Tann lesandi má fylgja reglunum um vísindaligt rættlæti. Tað er óreiðiligt at lata vera við at uppgeva/dylja á slíkan hátt, at villleiðing stendst av viðvíkjandi avriki hjá viðkomandi lesandi. Til dømis metist tað sum dyljing ikki at geva upp allar heimildir til ritgerð. Avskrift og eftirgerð av tekstum hjá øðrum er falsan, um ikki greitt verður tilskilað, hvat er sitat, og hvat er endursøgn av teksti hjá øðrum, og hvaðani hugmyndir, sum ikki eru almennar og ikki eru tær hjá tí lesandi, eru fingnar.

Verður stuldur og svik avdúkað í skrivligum uppgávum, bæði próvtøkuuppgávum og øðrum innlatingum, verður hetta revsað, og í ringasta føri kann tann lesandi verða burturvístur av Fróðskaparsetrinum.

Øll endurgáva, sum verður gjørd uttan at gera vart við, at hetta eru tankar hjá einum øðrum, er svik og verður revsað. Dømi, sum heilt greitt eru svik, er at lata uppgávu inn, sum tann lesandi ikki sjálvur hevur skrivað ella at lata somu uppgávu inn til fleiri próvtøkur.

At endurnýta partar av eini uppgávu, ið er latin inn til annað skeið, er somuleiðis svik.

## 13.2 Góðskriving

Um lesandi hevur staðið fak á øðrum universitetum, sum eru á sama ella hægri fakligum støði við sama fakliga innihaldi og/ella kunnu stuðla undir útbúgvingina sum heild, kunnu tey søkja um at fáa hesi fak góðskrivað, sum partar av útbúgvingini á Fróðskaparsetrinum. Tó kunnu í mesta lagi 45 ECTS góðskrivast. Endalig avgerð, um skeið verður góðskrivað, verður tikin av lestrarráðnum. Umsókn um góðskriving skal latast deildarskrivaranum á Námsvísindadeildini.

Søkjast kann leypandi gjøgnum árið, men um lesandi ynskja at umsóknin skal verða viðgjørd, áðrenn skeiðið byrjar, so er freistin hendan:

Seinasta freist fyri skeið sum byrja á vári: 1. oktober

Seinasta freist fyri skeið sum byrja á heysti: 1. mars

Nærri kunning um góðskrivingar, mannagongdir og oyðubløð eru at finna á heimasíðu Setursins.

## 13.3 Farloyvi

Søkjast kann um farloyvi umvegis deildarskrivstovuna á Námsvísindadeildini. Eru ivamál í hesum høpi, verður víst til lestrarvegleiðaran.

## 13.4 Útskriving

Velur tann lesandi at útskriva seg frá lestrinum, verður hetta gjørt við at venda sær til deildarskrivstovuna á Námsvísindadeildini og við at útfylla oyðublað til hetta endamál. Gerast skal

vart við, at um tann lesandi ynskir at byrja lesturin aftur, skal hann/hon søkja umaftur á jøvnum føti við onnur lesandi.

### 13.5 Samskifti

Samskifti við tey lesandi fer einans fram umvegis teirra lestrarteldupostadressu og ígjøgnum Moodle. Øll skeið verða samskipað umvegis Moodle, við undirvísingarætlan viku fyri viku. Á Moodle koma boð um hvussu innlating til próvtøku fer fram.

### 13.6 Námsstig og arbeiðstyngd

Námsstig eru ein roknieind fyri støddina á einum skeiði og arbeiðsbyrðuna hjá tí lesandi. Hon verður uppgjørd eftir evropeisku ECTS skipanini (European Credit Transfer System). Hetta er ein felags skipan, sum ger tað lættari at flyta avrik millum lond og útbúgvingar. Námsstigini verða uppgjørd soleiðis:

1 ECTS svarar til 27,5 arbeiðstímar hjá tí lesandi – alt íroknað (fyrireiking + undirvísing + bólkaarbeiði + venjingar og próvtøka)

Eitt 10 ECTS skeið svarar sostatt til 275 arbeiðstímar hjá tí lesandi. Ein fulltíðarlesandi hevur 30 ECTS hvørja lestrarhálvu, og skal tí rokna við at brúka 825 arbeiðstímar hvørja lestrarhálvu.

### 13.7 Lestrarárið

Lestrarárið byrjar í viku 34 og endar í viku 25. Eingin undirvísing, sum er kravd í sambandi við útbúgvingina, fer fram uttanfyri hetta tíðarskeiðið.

### 13.8 Eftirmeting av skeiðum, linjum og ritgerð

Fyri at menna og góðskutryggja útbúgvingina, verða øll skeið, linjur og ritgerð eftirmett við eftirmetingarskjali. Starvsfólk frá fyrisitingini fyriskipa og fremja hesa eftirmeting.

Allar eftirmetingar eru dulnevndar.

# 14.0 Treytir um broyting í námsskipan

Útbúgvingarleiðarin kann gera uppskot til broytingar í námsskipanini, og hesar skulu góðkennast av lestrarráðnum. Lestrarráðið kann eisini heita á útbúgvingarleiðaran og viðmæla broytingar í námsskipanini. Møguligar broytingar koma í gildi við lestrarársbyrjan.

Um størri broytingar verða gjørdar í námsskipanini, skulu lesandi hava møguleika at gera seg lidnan eftir tí námsskipan, sum var galdandi, tá ið tey vóru innskrivað sum lesandi á Námsvísindadeildini, ella hava møguleika at fylgja einari skiftisskipan góðkend av lestrarráðnum.

Námsskipanin skal vera tøk á heimasíðu Fróðskaparsetursins.

# Lestrarmøguleikar á NÁD og í nærumhvørvinum

Á Námsvísindinadeildini, ber til at lána bólkarúm. Til ber at nýta tóm høli, men um tann lesandi skal tryggja sær eitt ávíst høli ein ávísan dag ella tímar, skal nærri avtala gerast við skrivstovuna. Tað er ikki møguligt at lána eitt høli í eitt longri tíðarskeið.

Kantinan á Námsvísindadeildini kann eisini brúkast til bólkaarbeiði, hugna og sosiala samveru. Til ber at keypa kaffi og eina máltíð ella at taka egnan matpakka við í Kantinuna. Hetta er eitt stað har tey lesandi kunnu møtast bæði í álvara og gaman.

# Bókasøvn

Bókasavnið á Námsvísindadeildini hevur eitt breitt úrval av bókum um lærara- og námsfrøðiøkið, og eisini aðrar fakbókmentir. Bókasavnið er ein týdningarmikil liður í lesnaðinum, og tí er umráðandi, at lesandi gagnnýta tað.

Bókasavnið er opið vanliga undirvísingartíð. Eitt yvirlit yvir, nær bókavørður er á bókasavninum hongur á rútinum vinstrumegin hurðina á bókasavninum.

Í august mánaði fáa lesandi lánarakort. Bøkur kunnu verða læntar ein mánað í senn.

Er bókavørður ikki til staðar, tá ið lænt verður, ber til at brúka sjálvlánið.

Onnur bókasøvn, ið lesandi hava atgongd til, eru m.a.:

Landsbókasavnið,www.flb.fo
Landsmiðstøðin,www.lms.fo
Býarbókasavnið, www.bbs.fo

Á bokasavn.fo finnur tú leinki til øll bókasøvn í Føroyum.

# Fylgiskjal 1

**Luttøku- og møtiskylda**

Sambært § 3 í Kunngerð nr. 149 frá 13. november 2009 um útbúgving av fólkaskúlalærarum og námsfrøðingum hava lesandi skyldu til at luttaka í allari undirvísing, vegleiðing og eftirmeting, sum stovnurin skipar fyri.

Lærararnir hava skyldu til at skráseta luttøkuna, og mishald av luttøku kann hava við sær, at lesandi ikki kunnu verða eftirmett ella fara til próvtøku.

Luttøkuskyldan verður býtt upp í :

1. Luttøkuskyldu
2. Møtiskyldu

Tey lesandi skulu verða kunnað um luttøku- og møtiskylduna við lestrarbyrjan í øllum skeiðum.

**1. Luttøkuskylda**

Lesandi hava skyldu til aktivt at taka lut í teimum lestrarskeiðum og tiltøkum , sum verða skipað í útbúgvingini.

Luttøkuskyldan fatar bæði um avbjóðingar í einstaklings- og felagshøpi. Tann einstaki lesandi hevur ábyrgdina av síni egnu útbúgving, men skal harumframt eisini taka lut í tiltøkum saman við øðrum. Talan er millum annað um at lata inn kravdar uppgávur umframt aktiv luttøka í bólkaarbeiði, verkætlanum og felagstiltøkum, ið eru partar av undirvísingini.

Samstarv, samskifti og dialogur eru týðandi tættir í lærara- og námsfrøðingayrkinum, og tí hevur tað stóran týdning, at tann lesandi í sínari útbúgving sýnir, at hon/hann umframt fakligan dugnaskap og ídni eisini megnar hesar tættir í síni lestrartíð. Samanumtikið kann sigast, at luttøkuskyldan skal skiljast sum aktiv luttøka í teimum undirvísingargongdum og tiltøkum, sum verða skipað í útbúgvingini.

Um ein lesandi kann skjalprógva vantandi luttøku við læknaváttan ella á annan hátt, verður hædd tikin fyri hesum í skrásetingini.

Í teimum førum, har luttøkuskyldan verður mishildin, verður farið fram sambært niðanfyri standandi reglum um hesi viðurskifti.

***Luttøkuskyldan mishildin:***

Einstaki undirvísarin skrásetir luttøku teirra lesandi og hevur skyldu til at gera tann lesandi varan við møguligt mishald í sambandi við luttøkuskylduna.

Er luttøkuskyldan mishildin, kann undirvísarin gera av um lesandi skulu:

(1) upp í fullum pensum við skeiðslok
(2) skriva eina einstaklingsuppgávu
(3) taka skeiðið umaftur

**2. Møtiskylda**
Lesandi hava skyldu til at møta upp til undirvísing, vegleiðing og eftirmeting í sambandi við øll skeið í útbúgvingini. Møtiskyldan fatar um allar partar av útbúgvingini, har ein lærari/gestalærari er hjástaddur í sambandi við frammanundan fyrireikað undirvísingar- ella lestrarvirksemi.

Møtiskyldan fatar eisini um starvslæruna, og tá hevur praktikklærarin/-skúlin ábyrgdina av at skráseta uppmøting teirra lesandi.

Tann einstaki lesandi hevur rætt til innlit í sína skráseting, bæði hjá Námsvísindadeildini og hjá starvslæruskúlanum.

Um ein lesandi kann skjalprógva fráveru við læknaváttan ella á annan hátt, verður hædd tikin fyri hesum, tá ið frávera verður gjørd upp.

Í teimum førum, har møtiskyldan ikki er uppfylt, verður farið fram sambært niðanfyri standandi reglum um hesi viðurskifti.

***Møtiskyldan mishildin (undirvísing):***
Einstaki undirvísarin skrásetir luttøku teirra lesandi og hevur skyldu til at gera tann lesandi varan við møguligt mishald í sambandi við møtiskylduna.
Er lesandi burtur meiri enn 25% av undirvísingartíðini uttan haldgóða grund, skal viðkomandi, umframt vanligu uppgávurnar, annaðhvørt:

(1) til munnliga roynd í fullum pensum við skeiðslok
(2) til skrivliga 6-tímaroynd við skeiðslok
(3) ella skriva eina einstaklingsuppgávu

Avvarandi undirvísari avgerð hvørja roynd ella uppgávu, hin lesandi skal gera.

Er lesandi burtur meiri enn 40% av undirvísingartíðini, fær viðkomandi boð um:

(4) at taka skeiðið umaftur

*(Gevið gætur: Í hesum føri er "haldgóð" grund ikki galdandi)*

Um lesandi er burtur meiri enn 40% av undirvísingartíðini í tveimum ella fleiri skeiðum skeiðum, verður lesturin hjá viðkomandi tikin upp til viðgerðar í leiðsluni, og verður viðkomandi møguliga biðin um at steðga við útbúgvingini.

***Møtiskyldan mishildin (starvsvenjing):***
Praktikkskúlin/-lærarin boðar frá, hvussu tann lesandi hevur møtt upp til ráðlagda undirvísing og onnur kravd tiltøk í starvsvenjingartíðarskeiðinum. Um mett verður, at møtiskyldan er mishildin, verður avgerð tikin um, hvørjar avleiðingar hetta skal fáa. Talan kann í slíkum føri vera um, at tann lesandi skal taka írestandi partarnar av starvsvenjingini ella – tá fráveran hevur verið ov stór – alla starvsvenjingina umaftur. Hetta kann hava við sær, at starvsvenjingin fyri viðkomandi tíðarskeið ikki verður góðkend.

**Námsvísindadeildin 2017**